# Koyr á Vestfallið

**Tann, sum fer í mølina, nú hann hevur ligið tráður imóti landi í fleiri dagar, sær týðiliga, hvussu nógv burturkast liggur og rekist í sjónum**

ÓRUDD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Koyr ikki á Vestfallið!**
Hetta er boðskapurin í eini lýsingaherferð í sjónvarpinum, sum vendir sær til okkara skipaflota.

Endamálið er at fáa skip at lata vera við at tveita burturkast og órudd fyri borð, men heldur taka tað við til lands og beina tað burtur í bingjur.

Men tann, sum fór sær ein túr í mølina, nú hann hevur ligið tráður ímóti landi í fleiri dagar, skal ikki ganga langt, áðrenn illgrunin fer at gnaga um, at kanska eru tað ikki øll, sum hava sæð hesa lýsingina í sjónvarpinum.

Í øllum førum gongur sjón fyri søgn, hvussu nógv órudd framvegis liggur og rekist í sjónum.

Hvalba er ein bygd, sum vendir eystureftir og sum væl kann brúkast sum barometur fyri, hvussu standurin er.

Men tað er ikki tespuligt at fara sær ein túr á vakra og friðsæla Hvalbiarsandi í dag.

Tað, sum leyp í eyguni er alt óruddið, sum er lagst í mølina í kjalarvørrinum á uppganginum hesar seinastu dagarnar.

Og hvalbingar siga, at hetta er skilið, hvørja ferð, hann legst við óveðri av eystri.

Og so stendur kommunan eftir við upptakinum.

Vit kunnu bara geva hvalbingum rætt: Nakað prýði fyri bygdina og føroyingar, sum heild, er hetta ikki.

Ein leyðslig uppteljing vísir, at her eru bæði plastdunkar í hópatali, boyur, endar av nylon, plast av ymsum slagi og annað gott.

So vit kunnu bara bera vinarligu áheitanina frá hvalbingum til skipini víðari: Vísi náttúruni ans og latið vera við at tveita alt órudd fyri borð. Tað, sum fer fyri borð, hvørvur ikki fyri tað um tað er farið úr eygsjón, tí tað rekur altíð upp á onkrari fjarari strond.

Hvalbingar sipa speiskliga til visjón 2015: Skulu vit vera heimsins fremsta tjóð, mugu vit sanniliga eisini vísa náttúruni ans.



*Hvalbiarsandur er ikki tespuligur, nú hann hevur ligið av eystri í fleiri dagar. Dunkar, boyur, endar og plast er tað, hvalbingar eru vælsignaðir við. Fyrr vóru menn at leita eftir reka eftir slíkt veður, men slíkur reki man ikki hava verið høgt í metum*

# Strandferðslan fór upp um milliónina

**Í fjør fór ferðafólkatalið hjá Strandferðsluni upp um eina millión**

FERÐAFÓLKAFLUTNINGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Strandferðslan hevði stóra framgongd í fjør, afturímóti árinum frammanundan.

Ein uppgerð hjá stovninum vísir, at í fjør ferðaðust 1,1 millión ferðafólk við skipum og bussum hjá stovninum.

Hetta eru 107.000 fólk fleiri ferðadólk enn í 2005 og sostatt er talan um ein vøkstur upp á 11%.

Ferðafólkatalið við ferjunum var umleið 480.000 og tað er 60.000 fólk fleiri enn í 2005. Tilsamans er talan um ein vøkstur upp á 14%. Ferðafólkatalið við bussunum var 620.000 og tað er 28.000 fleiri ferðafólk enn árið fyri og tað er ein vøkstur upp á 9%.

Annars flutti ferjurnar 130.000 bilar í fjør og tað eru 23.000 fleiri bilar enn í 2005. Í prosentum er talan um ein vøkstur upp á 21%.

Her er siglingin um Leirvíksfjørð ikki tald við, tí hon var niðurløgd í apríl í fjørð.



*Bæði bussar og skip hava flutt munandi fleiri fólk í fjør, enn tey gjørdu í fyrrárið*

**Kalsoyarsiglingin størst vøkstur**
Størsti lutfalsligi vøksturin hjá ferjunum var á Kalsoyarleiðini. Tilsamns sigldu 30.000 ferðafólk um Kalsoyarfjørð og tað er ein vøkstur upp á 36%. Bilatalið var 7.000 og tað er ein vøkstur upp á 27%. At Sam nú røkir leiðina ístaðin fyri Barsskor, er helst orsøkin til vøksturin.

Men talan er eisini um stóran vøkstur á bæði Suðuroyar- og Sandoyarleiðunum. Smyril flutti 193.000 ferðafólk til og úr Suðuroy og tað er ein vøkstur upp á 18%. Smyril flutti eisini 68.000 bilar og tað er ein vøkstur upp á 26%. Teistin flutti 173.000 ferðafólk úr Sandoy og tað er ein vøkstur upp á 12% . Teistin flutti eisini 56.000 bilar og tað er ein vøkstur upp á 14%.

**Tórshavn og Klaksvík er størst**
Samanlagt ferðaðust 162.000 fólk við bussinum ímillum Tórshavn og Klaksvík. Hetta er størsta bussrutan hjá Strandferðsluni og vøksturin á leiðini var 2% í afturímóti árinum fyri.

Annars royndust leið ímillum Klaksvík og Fuglafjørð eisini væl. Hon varð tikin í nýtslu seinast í apríl í fjør í samstarvi við kommununa í Fuglafirði, Leirvík og Klaksvík. Íalt 35.000 fólk ferðaðust við leiðini í fjør, og Strandferðslan væntar aftur vøkstur í 2007.

Á leiðini millum Tórshavn og Flogvøllin og Sørvág ferðaðust íalt 94.000 ferðafólk og tað er ein vøkstur upp á 3%. Um helmingurin av ferðafólkunum á hesi rutuni eru til og frá flogvøllinum. Vøksturin á flogvøllin var 13%.

# Besta lýsingin skal finnast

**Aftur í ár er ætlanin at finna tær bestu, føroysku lýsingarnar, men í ár verða nógv fleiri virðislønir at kappast um**

VIRÐISLØNIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Aftur í ár verða virðislønir latnar bestu føroysku lýsingina. Tað fer fram tann 27. apríl, tá ið Kolan 2007 virðislønirnar, verða latnar bestu føroysku lýsingunum hesi bæði seinastu árini.

Í fjør skipaði Vinnuvitan fyri Ad-Event tiltakinum og tá varð virðisløn latin fyri bestu føroysku prentlýsingina. Tann, sum vann, var ein lýsing hjá Strandferðsluni, sum Sansir hevði gjørt.

Í ár verða fleiri lýsingabólkar at kappast um, eitt nú sjónvarpslýsingar, grafiskt snið, útvarpslýsingar og lýsingaherferð. Tilsamans eru átta bólkar at kappast um.

Umframt hetta fær almenningurin eisini høvið at atkvøða um bestu lýsingina, eisini kallað "Fólkið velur".

Tað er reklamufelagið, sum velur Dómsnevndina og í henni vera bæði føroysk og útlendsk lýsingafólk, sum øll eru serfrøðingar á økinum.

Tiltakið "Kolan 2007" er skipað soleiðis, at lýsingavirkini senda inn lýsingar til kappingina. Dómsnevndin innstillar síðani fimm lýsingar í hvørjum bólki og burturúr rúgvuni verða vinnararnir síðani funnir og Virðislønirnar verða handaðar á stórfingnum tiltaki í Havnar Bio í vár

Tað er Vinnuvitan, sum skipa fyri í samstarvi við Reklamufelagið